DAGSINS MEINING

Tjó›, men ikki sjálvstø›ug tjó›

Føroyar eru ein tjó›, men ikki ein sjálvstø›ug tjó›. Vit eru í einum ríkisfelagsskapi, har Danmark eitt nú hevur uttanlandamál og herna›armál um hendi. Vit kunnu gerast sjálvstø›ug í morgin, um ta› skal vera. Harmiligt er bert, at tjó›veldismenn ikki tora at loysa vi› 4 ára skiftistí› og nú ganga og uppfinna trupulleikar til at øsa Føroya fólk. Trupulleikin er tann, at samgongan letst at hugsa vi› hjartanum, men tá i› á stendur, so eru ta› fíggjarligu fortreytirnar, i› viga tyngri. Ta› er hóast alt ikki so stórur munur á politisku flokkunum í Føroyum, men Tjó›veldisflokkurin roynir at fyrigykla sær og ikki minst føroyska veljarnum, at trupulleikin ikki er um búskaparligar fortreytir.

Tjó›veldisflokkurin hevur altí› sagt, at einki ber til millum amt og loysing. Teir hava altí› arbeitt út frá tí, at heimast‡rislógin var ein skipan, sum ikki bar til. Spyr formannin í Tjó›veldisflokkinum, hvør hevur ognarrættin til undirgrundina. Hann hevur longu, ikki sørt ódámligt og ábyrgdarleyst, sáa› iva um hetta alment. Spyr formannin í Tjó›veldisflokkinum, um naka› er, sum eitur ósjálvstø›ug tjó›. Tjó›veldisflokkurin vil til eina og hvørja tí› siga, at einki eitur ósjálvstø›ug tjó›, hóast vit hava veri› ein tjó›, men ikki ein sjálvstø›ug tjó› nú í meira enn 50 ár.

Heimast‡rislógin er ikki longur nøktandi, ta› eru fólk flest á einum máli um. Harmiligt er bara, at samgongan brúkar so nógvar kreftir uppá at undirminera tey rættindi, vit føroyingar gjøgnum si›venju hava vunni› okkum gjøgnum 50 ár. Enn meira harmiligt er, at Fólkaflokkurin — ella rættari sagt løgma›ur — letur seg draga vi›, solei›is, at á›renn vit vita av, so hava vit havt eina fólkaatkvø›u um at vit føroyingar eru ein tjó›. Eingin fer at siga nei til eina slíka sjálvfylgiligheit, og so fara tjó›veldismenn at pástanda, at føroyingar hava atkvøtt fyri loysingini, tí einki sambært teirra teoriappariti loyvir einari ósjálvstø›ugari tjó›. Hetta fáa teir onkran sokalla›an óheftan sertfrø›ing at siga, og so eru vit aftur í tjó›veldissjangrinum um, at Føroyar ikki eru meira enn eitt amt, um loysingin ikki gerst veruleiki. Løgi›, at 50 ár kunnu ganga uttan at Tjó›veldisflokkurin kemurví›ari. Sjálvsagt ber ta› til at gera eina skipan innan ríkisfelagsskapin, i› ikki sum samgonguuppskoti› byggir uppá kravmentalitet og ósmædni. Hinvegin sleppa vit sjálvsagt at loysa beinanvegin, um vit vilja, men evsta vald ver›ur, sum rímiligt er, ikki fyri annans gjald.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Stillar ikki upp

Ein b‡rá›sforma›ur leggur frá sær. Jákup Lamhauge, sum seinastu átta árini hevur stjórna› Runavíkar Kommunu, hevur avgjørt ikki at stilla uppaftur til b‡rá›svali›. Sjálvur sigur hann, at honum hevur dámt væl kommunuarbei›i›, men nú er stundin komin at lata onnur sleppa framat.

–Eg havi siti› í kommununi í 24 ár og seinastu átta árini sum forma›ur.

Hans Jákup er 61 ára gamal og hann hevur havt vi› kommununa at gera sí›an hann var heilt ungur. Hann var havnameistari frá 1966-93, tá hann gjørdist b‡rá›sforma›ur.

Havnin í Runavík hevur stóran t‡dning. Har koma eini 30.000 tons av fiski upp á land um ári› og nógvur farmur er eisini. Havnin ver›ur nú ví›ka› og hon ger seg eisini út til komandi oljuvinnuna.

Jákup er skipsførari og á›renn hann leg›ist upp á landi førdi han Maritenu á sild eitt skifti. Hann sigldi eisini í tvey ár hjá DFDS sum st‡rima›ur. Árini úti í heimi hava havt stóran t‡dning fyri Jákup seinni í lívinum.

Í farloyvi

42 ára gamli dómarin, Maiken Johansen úr Havn, er farin í farloyvi og nú arbei›ir hon aftur sum advokatur í Keypmannahavn. Orsøkin er, at enn er ta› ikki eydnast manninum at fáa eitt hóskiligt starv heima í Føroyum. Maiken er dóttir Kjartan Johansen, sála.

Í hennara sta› er settur sum dómari danin Jørgen B. Petersen, sum eisini er 42 ára gamal. Hann tók vi› starvinum fyrst í hesum mána›inum.

Minningaror› um Katrin Thomassen

T‡sdagurin 3. oktober var ein tungur dagur á Føroya Studentaskúla og HFskei›i. Um mi›dagsleiti› fór flaggi› á hálva stong, tá ta› frættist at ein av lærarum skúlans, Katrin Thomassen, var dey›. Vit eru øll skelka›i, at vit so knappliga hava mist ein av starvsfeløgum okkara og lærara hjá næmingunum. Sí›st vit sóu hana, var hon livandi og aktiv sum altí›, áhuga› í skúlanum, og nú er hon burtur. Hon hevur veri› meira enn 30 ár á skúlanum, og gjørt eitt stórt arbei›i, bæ›i í undirvísingini, og eisini í lærarahøpi og í næmingahøpi. Øll vit, i› nú arbei›a á skúlanum, og sum vóru yngri enn hon, hava uppliva› tá vit byrja›u at arbei›a her, at hon bjó›a›i okkum vælkomin, og tók væl ímóti okkum. Nú hon doy›i, var hon limur í samstarvsnevndini á skúlanum, og har hevur hon veri› fastur limur í fleiri ár. Í lærararár›num var hon í fleiri umførum forma›ur, og altí› ein sera aktivur luttakari á fundunum, og tá ávísar uppgávur skuldu loysast, bey› hon seg ofta fram.

Undirvísingin hjá Katrin fór fram bæ›i innanfyri og uttan fyri skúlagátt. Nógvir næmingar hava gjøgnum árini reika› vi› henni runt um land okkara at hyggja eftir jar›frø›iligum vi›urskiftum, i› høvdu hennara stóra áhuga. Tá næmingar fóru á námsfer› útlendis, var hon altí› til rei›ar at fara vi›. Í ár var hon vi› ikki minni enn tvær fer›ir. Sí›sta fer›in vi› næmingum var nú í august til Hetlands at kanna oljuvinnuna har. Hesin túrurin var sera aktuellur og læruríkur fyri næmingarnar.

Hóast hon var millum teir lærarar á skúlanum, i› hava veri› longst, so var hon ikki bangin fyri at taka n‡ggjar avbjó›ingar upp. Sjálvonnur leg›i hon lunnar undir n‡ggju lærugreinina Oljufrø›i, har hon eisini var sjálvskriva›ur lærari. Hon gjørdist gó›ur vinur vi› telduna, og sat ofta og hugdi eftir ve›urkortum á alnótini. Fyri frítí›arfiskararnar á skúlanum ver›ur ta› ein saknur at hava mist hennara umsorgan, sum var at prenta ve›urkortini, i› lógu klár fríggjadag seinnapart.

Katrin Thomassen var sera ættkøn, og altí› royndi hon at fáa meira at vita, serliga um fólk í gomlu Havnini. Har hevur mangur fingi› eitt gott prát vi› hana, og ofta visti hon meira enn tú sjálvur um tína egnu ætt.

Hon var heil, har hon var. Hon hev›i sínar avgjørdu meiningar, men var samstundis sera gó› at arbei›a saman vi›.

Hennara lívslei› hevur ikki altí› veri› løtt. Fyri 12 árum sí›ani gjørdist hon einkja, og hon hevur hesi árini havt ógvuliga tungt at vinna á sorgini.

Hennara fasti stólur í roykistovuni hjá lærarunum er tómur, men vit hava so nógv gó› minnir at rógva afturá, sum kunnu troysta okkum í sakninum. Vit l‡sa fri› yvir minni› um Katrin Thomassen, og hava samkenslu vi› børnum hennara, i› nú hava mist bæ›i foreldrini í bestu árum.

Mads A. Winther
rektari

Tøkk

Øllum tykkum, sum vi› blómum, gávum og telegrammum, tykkum, sum stukku inn á gólvi› og á annan hátt gleddu meg og gjørdu mær 95 ára dagin so hugnaligan, takki eg hjartaliga. Eina serstaka heilsan og tøkk sendi eg tykkum á No r›oya Røktarheimi. Harrin signi tykkum øll.

Hjørdis Hansen

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Arbei › i › byrja›i í gjár

SU‹UROYARSKIPI‹
Áki Bertholdsen

Í gjár var› av álvara skjøtil settur á arbei›i› at projektera ta› n‡ggja su›uroyarskipi›.

Bólkurin hjá Strandfer›sluni, sum hevur fyrireika› byggingina og sett krøvini fyri skipi› upp, fór til Danmarkar í vikuskiftinum. Og í gjár fór bólkurin á fund vi› felagi›, Knud E. Hansen, sum skal projektera tann n‡ggja Smyrilin.

Strandfer›slan hevur fingi› nakrar spurningar frá Knud E.Hansen, sum hon skal svara uppá, og sí›ani ver›ur arbeitt ví›ari út frá tí.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, sigur, at fyrsta stigi› á fundinum mánadagin var, at hann sjálvur helt ein uppl‡sandi fyrilestur fyri teimum, sum skulu projektera Smyril, um Strandfer›sluna og um strandfer›slu í Føroyum. Hetta ver›ur gjørt, so at teir fáa eina betri hylling á fortreytunum fyri strandfer›slu í Føroyum og, hvat teir hava vi› at gera, hvussu farlei›in er, hvussu ve›ri› er, o.s.fr.

Íme›an bólkurin er ni›ri, fer hann eisini kanningarfer› at hyggja at skipum og á onkur virki, sum gera motorar o.s.fr.

Ta› kostar 500.000 at projektera tann n‡ggja Smyrilin og projekti› skal ver›a li›ugt 14. desember.

Tann n‡ggi Smyrilin tekur um 200 bilar, ta› er næstan tvær fer›ir so nógv sum Smyril, i› nú er. N‡ggi Smyril fer at taka um 800 fer›afólk um summari› og 500 um veturin, ta› er ta› sama sum Smyril, i› nú er, tekur. Men n‡ggi Smyril ver›ur munandi betur útgjørdur í allar mátar. Hann ver›ur um 115 metrar langur og skal sigla 21 míl. Sostatt fer ta› at taka um 1 tíma og 35 minuttir at sigla av Tvøroyri til Havnar.

Gongur sum ætla›,ver›ur kjølurin strektur næsta heyst og ta› fer at taka um tvey ár at byggja skipi›.

Í projektbólkinum sita Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, Magnus Magnussen, tekniskur lei›ari á Strandfer›sluni, Hanus Lassen, skipari, Petur Winther, maskinstjóri, Jógvan Nybo, 1. meistari, Heri Joensen, fólkaflutningslei›ari á Strandfer›sluni, Pauli Larsen, skipari og Øssur Nielsen, maskinstjóri. Harafturat hava eisini su›uroyingarnir Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur í Vági, Dan Nielsen, b‡rá›sforma›ur á Tvøroyri, umframt vinnulívsmenninir Heri Hjelm og Viberg Sørensen, veri› í projektbólkinum. Skrivari hjá bólkinum er Johan Isholm á Strandfer›sluni.

Men ta› skilst, at ta› eru bara nakrir í bólkinum, sum skulu avsta›.



Arbei›i› at projektera n‡ggja Smyril byrjar av álvara mánadagin. Projekti› skal ver›a li›ugt 14. september

Nú eru krøvini komin

Tvøroyar Kommuna hevur nú fingi› at vita, hvørji krøv ver›a sett til hølini, sum n‡ggi almanna- og heilsuskúlin skal vera í, og nú ver›ur fari› at kanna, hvørji høli kunnu brúkast

ALMANNA OG HEILSUSKÚLIN
Áki Bertholdsen

Tvøroyrar Kommuna fer nú av álvara at leita eftir hølum til tann n‡ggja almanna- og heilsuskúlan, sum skal vera á Tvøroyri.

B‡rá›i› hevur ikki kunna› útvega høli til skúlan fyrr, tí ta› er ikki fyrrenn nú, at ta› hevur fingi› at vita frá Undirvísingar- og mentamálast‡rinum, hvørji krøv ver›a sett til hølini og, hvør ætlanin annars er vi› hesi n‡ggju útbúgvingini.

Dan Nielsen, b‡rá›sforma›ur á Tvøroyri, sigur, at sjálvandi hevur b‡rá›i› havt onkur høli í kikaranum, men ta› er nústani, at ta› ber til at hyggja nærri eftir ymsum hølum í kommununi.

- Nú fara vit at meta um tey høli, sum kunnu koma uppá tal útfrá teimum krøvum, sum Undirvísingar- og mentamálará›i› hevur sett, sigur b‡rá›sforma›urin.

Men hann sigur, at b‡rá›i› fær ikki so stutt skotbrá at útvega hølini í, sum ta› annars hevur veri› líkt til, tí skúlin skal ikki byrja 1. januar, sum annars ætlanin hevur veri› alla tí›ina.

- Vit hava fingi› at vita, at skúlin skal hava hølini tøk frá 1. februar at rokna, sigur Dan Nielsen.

Hann sigur, at í fystu atløgu er ætlanin at byrja vi› eftirútbúgvingini av heimahjálpum. Ta› eru styttri skei› fyri tær, sum hava veri› heimahjálpir eitt áramál.

Seinni er so ætlanin at fara undir sjálva útbúgvingina, sum tekur longri tí›.

Men Dan Nielsen sigur, at tey hølini, sum kommunan fer at útvega nú, ver›a bara fyribils.

- Vit fara at finna eini høli nú, men ta› ver›ur vi› teirri treyt, at Undirvísingar- og Mentamálast‡ri› hevur funnni› eina varandi loysn um tvey, ella tr‡ ár.

Annars er lei›ari fyri skúlan settur og hann skal hava skrivstovu tøka longu frá 1. desember.

Annars hevur skúlin brúk fyri skúlastovu til 20 næmingar og eini venjingarstovu vi› ymsum hentleikum at vaska og skola o.a. Harafturat skal skúlin hava køk, rúm til ítriv, lærararúm, uppihaldsrúm til næmingar og bókasavn.

Afturat øllum hesum er ta› ney›ugt at finna bústa›ir til næmingarnar, sum jú fara at koma úr øllum landinum.

Men Dan Nielsen ivast ikki í, at brúkilig høli ver›a útvega› til tí›ina.